VALGREINAR

# Endurnýggjan av tí politiska flotanum

**Kristian Eli Zachariasen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Norðuroyggjum*



Tey seinastu árini er ein endurnýggjan farin fram av tí føroyska fiskiflotanum. Nýggj, stásilig og munandi effektivari skip eru komin ístaðin fyri tey gomlu, ið als ikki vóru tíðarhóskandi longur. Og sæst hetta eisini aftur hjá td. nótaskipinum, har ið 7 føroysk skip liggja á topp 10 yvir nótaskip, ið hava fiska mest í Norðatlantshavinum

Ein freistast til, at samanlíkna fiskiflotan við politiska leikpallin, har kanska flestu av skútunum ikki eru tíðarhóskandi longur. Og hava onkrar av teimum møguliga brúkt alt brennievni, soleiðis at eingin framdrift er í hesum skútunum longur.

Harafturat vóru nakrar av hesum skútunum, ið skuldi eitast fyri at partrola, farnar at stýra í hvør sína kós, soleiðis at tað tilfeingi, ið tær annars vildu borið til Føroya fólk fór fyri skeyti.

Vit eru komin til eina nýggja gongda leið. Eina leið við nýggjum, effektivum og tíðarhóskandi skútum, ið eru fullar av brennievni.til at tryggja okkum framdriftina í tí nýggja føroyska samfelagnum tey komandi árini.

Tíðin, har ið kjalarvørrurin var brúktur at stýra eftir er farin! Sjálvstýrisflokkurin bjóðar seg fram til hetta vali, við ungum nýggjum kreftum, har ið dentur fer at verða lagdur á kósina fyri framman og eitt fast stavnhald tey komandi árini.

Gott val

# Leigulóggávan má dagførast

**Heðin Mortensen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Eitt afturvendandi evni undan vali eru umstøðurnar hjá teimum, ið búgva til leigu, men eisini umstøðurnar hjá útleigarunum.

Báðir partar standa rættiliga einsamallir, tá hugsað verður um galdandi lóggávu á økinum, tí her tørvar okkum at fáa skipað viðurskifti. Umráðandi er at tryggja bæði leigara og útleigara.

Í fyrsta lagi eru tað alt ov nógv leigumál, ið als ikki standa mát við tað, sum er rímiligt. Tað kann ikki vera meiningin, at fólk skulu rinda okursleigu fyri vánaligt býli, bara tí at útleigarin ikki leggur í at greiða síni viðurskifti til fulnar.

Tað átti at verið eitt sjálvsagt krav, at øll leigumál vórðu viðgjørd og góðkend av einari almennari leigunevnd, áðrenn ein íbúð ella eini hús kundu verið leigað út til fólk at búgva í, so krøv um brunatrygd og at allar vanligar umstøður vóru í lagi.

Samstundis skuldi leigulóggávan givið teimum útleigarum fyrimunir, ið hildu sínar skyldur og fingu síni ting góðkend og í rættlag.

Hetta kundi eitt nú verið gjørt við lagaligum reglum fyri skatting av leiguinntøkum, so góðkendir útleigarar fingið helvtina av leiguinntøkuni skattafría. So hevði tað loyst seg at leiga út uttan »svarta leigu«, samstundis sum dygdin á íbúðum og húsum var í lagi.

Óivað sita mong við øðrum hugskotum og hugsanum um, hvussu hesi viðurskifti kundu blivið betri. Í øllum førum er tað upp á tíðina, at nakað verður gjørt við hetta mál, so leigulóggávan verður dagførd og gagnlig fyri allar partar.

# Uppskot Javnaðarfloksins um Fiskidagamarknað

**Jacob Vestergaard**
*valevni Fólkafloksins í Suðuroy*



Eitt av málunum, sum Javnaðarflokkurin er komin fram við í valstríðnum, er at stovnseta ein Fiskidagamarknað, sum skal umsita handil og avgjald av fiskiloyvum og fiskidøgum.

Útmeldingin frá Javnaðarflokkinum er ikki greið, og eg havið enn onga skilagóða frágreiðing hoyrt um, hvussu teir ætla, at Fiskidagamarknaðurin skal virka. Boðskapurin er, at Fiskidagamarknaðurin skal geva munandi ískoyti í landskassan.

Javnaðarflokkurin átti at sagt okkum, hvussu Fiskidagamarknaðurin skal virka. Skulu øll fiskiloyvir og allir fiskidagar inndragast og seljast á Fiskidagamarknaðinum - verður tað til fastan prís ella til hægstbjóðandi - skulu skipinið, sum loyvir og dagar verða tiknir frá, fylgja við - hvør sleppur at bjóða o.s.fr.

Hvussu stórt avgjald skal leggjast á tey ymisku loyvini og dagarnar - hvussu nógv skal hvør einstakur bátur/skip gjalda, skal tað verða eftir stødd ella eftir hvussu nógv verður fiska, o.s.fr.

Uppskot Javnaðarfloksins hongur ikki saman og kann ikki gjøgnumførast, uttan tað fær álvarsligar fylgjur fyri okkara fiskivinnu.

Vit hava eina vælvirkandi fiskivinnuskipan, kanska tað bestu í heiminum, og hana eiga vit at standa saman um. Skipanin/lógin krevur tó ábøtur og umsitingin av fiskiloyvum og fiskidøgum eigur at gerast meira gjøgnumskygd og tilgongilig, so øll kunnu fylgja við, hvat hendir.

Mín greiða meining er, at tað ongantíð verður rætt at leggja avgjald á fiskiloyvir, fiskidagar ella kvotur, tvørturímóti kemur hetta at virka darvandi fyri vinnuna.

Vinnan hevur fingið nakrar møguleikar, við teimum loyvum, sum givin eru. Vinningurin fyri samfelagið liggur í, at menn við áræði, dirvi og stórum dunaskapi hava útnytta hesar møguleikar og harvið skapt ovurhonds stór virðir til samfelagið.

Soleiðis hevur tað altíð verið og soleiðis má tað framhaldandi verða. Treytir eiga tó altíð at verða við, so hesi fiskiloyvir ella møguleikar, um vit kallað tað so, verða gagnnýttir, samfelagnum at frama.

Javnaðarflokkurin hevði skjótt gjørt enda á okkara vælvirkandi fiskidagaskipan, slapp hann at gjøgnumføra uppskotið um Fiskidagamarknað.

Besta trygdin fyri, at vit framhaldandi koma at hava heimsins bestu fiskivinnuskipan er at velja Fólkaflokkin 20. januar.

Gott val.

# Gloymið ikki vælgerðirnar

**Absalon Absalonsen**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Sál mín lovað Harranum og gloym ikki allar vælgerðir Hansara. Sálm. 103.2.

Gloymið ikki at gera væl og geva øðrum burturav frá tykkum. Hebr. 13.16.

Oman fyri standandi skriftorð renna mær mangan í huga nú valstríðið er í hæddini. Eg ivist onga løtu í, at mong í Føroyum hava tikið hesi skriftorð til sín og liva eftir teimum, takka Harranum í tí stilla og geva sínar olmussur so stillisliga og ósædd, at vinstra hond veit ikki hvat høgra ger.

Men hvussu er við almennu Føroyum, geva vit nakað til menningarhjálp ella hjálp til neyðstødd. Jú har standa 300 000 kr á fíggjarlógini, svarandi til 6 - SEKS - kr um árið pr íbúgva. Flestu føroyingar munnu halda hetta vera skomm.

Miðflokkurin setur sum treyt fyri at fara í samgongu, at hetta tal verður munandi hækkað.

# Alment og Privat (2)

**Jóhan Petur Johannesen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



**Hvør er uppgávan hjá tí almenna?**
Sambandsflokkurin vil fegin at vit hava eitt gott almannaverk. Eitt almannaverk, ið er fyri brúkaran, ið ger at vit øll kunnu gera brúk av tí tá ið okkum tørvar tað.

Hvørjar eru so tær almennu uppgávurnar:

1. Rættartrygd (dómsvald og politi)
2. Almanna- og heilsuverk
3. Útbúgving (øll skulu hava møguleika til at fáa eina útbúgving)
4. Góðan infrakstuktur vegir, havnir

Afturat hesum so hava vit í Føroyum almennar loftmiðlar SVF og ÚF, og er skyldan hjá teimum at verða til alment gagn fyri allar borgar. Tí hevði ikki verði meiri enn rímiligt at teir komu á fíggjarlógina, so at teir ikki høvdu fyri neyðini at havt eydnuspøl og lýsingar, men at eydnuspøl og lýsingar heldur var givið til privatar miðlar at fingið nyttu av.

Tí ynskja vit framhaldandi ríkisfelagsskap, so at vit kunnu hava eina góða

1. Rættartrygd (dómsvald og politi)
2. Almanna- og heilsuverk
3. Útbúgving øll skulu hava møguleika til at fáa eina útbúgving

Gott val



VALGREINAR

# Grøni grundvøllurin

**Kenneth Rasmussen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Eysturoy*



Náttúran er grøni grundvøllurin undir tilveru okkara. Náttúran er óbøtandi og skal umsitast á skynsaman hátt, tí er tað altíð ein spurningur um at finna eina javnvág.

Vit hava eina livandi jørð, og livikorini á jørðini er grundarlagið fyri livikorum okkara. Dálka vit jørðina, dálka vit okkum sjálvi. Vit skulu verja umhvørvið við at hava greiðar reglur fyri brúki av náttúrutilfeingi. Hetta tryggjar búskaparvøkstur eftir náttúrunnar treytum.

At SEV í 2004 fer undir aftur stórar útbyggingar og ger árinskanningar aftaná er heilt burturvið.

Tað skal vera lógarkrav, at tá ið størri verkætlanir verða framdar, so skulu haldgóðar og óheftar árinsmetingar gerast, áðrenn farið verður til verka.

Sjálvstýrisflokkurin virkar fyri einum umhvørvispolitikki, sum tryggjar, at menningin av okkara samfelag ikki skaðar umhvørvið. Vit vilja varðveita náttúrunnar fjølbroytni og tryggja góð livikor fyri komandi ættarlið.

..men fyrst tørvar okkum tín stuðul 20. januar.

# Sig ongantíð nakað um onnur……

**Bjarki Mohr**
*valevni hjá Javnaðarfloksins í Suðurstreymi*



**Miðfyrisitingin skal umskipast, men ongin hevur dirvi at tosa um eina møguliga avleiðing.**

Undir valstríðnum higartil, hava allir flokkar - eftir at Javnaðarflokkurin legði fram uppskot um at umskipa Miðfyrisitingina - verið á einum málið um, at tað er neyðugt at gera okkurt ítøkuligt við vaksandi umsitingina.

Ymisk valevnir hava kjakast um spurningin, onnur hava skriva í bløðunum. Eg havi við áhuga fylgt kjakinum, og má tíverri ásanna, at higartil hava valevnini snú sær undan at svara, tá talan kemur inn á møguligar avleiðingar av einari fyristandandi umskiping.

Endamálið við einari umskiping av aðalráðunum er kent. At tillaga fyrisitingina til føroyska samfelagið. At hækka tænastustøðið við betri samskipan. At tryggja umsitingina stabilitet í framtíðini, soleiðis at hon ikki skakast av politiskum neyðloysnum. Men ikki minst, at hon hóskar til fíggjarliga førleikan.

Frá 1998 til 2002 eru samlaðu inntøkur landskassans øktar við 724 milliónum kr. Sama tíðarskeið eru rakstrar- og íløguútreiðslurnar øktar við 804 milliónum kr., svarandi til eitt nettohall á 80 milliónir kr. Gongdin í 2003 er ikki betur - tvørturímóti - og kunnu vit tí ímynda okkum enn størri hall, tá endaligur landsroknskapur fyriliggur.

Vit sleppa ikki undan at fremja umskipanir - og rationaliseringar - skulu vit framhaldandi hava ein búskap í javnvág. Í omanfyri nevnda tíðarskeiðið, eru lønarútreiðslurnar hjá umsitingini øktar við góðum 200 milliónum kr. Hyggja vit eftir høvuðsvinnuni - Fiskiskapur - eru lønarútgjaldingarnar eisini øktar 200 milliónir kr., í sama tíðarskeiðið.

Tey, ið hava verið við til bygnaðarligar umskipanir - í privatum- ella almennum vinnum - vita, at man fyrst hyggur eftir hvør tænastutørvur skal nøktast, síðan hvørji fólk man hevur at nøkta tørvin við, og hvussu man skapar fíggjarligan- og fólksligan tryggleika.

Seinast - men ikki minst - hvussu sleppa vit av við dupult funktiónir, fyri at lætta um útreiðslustøðið.

Tað er neyvan nøkur loyna, at nógv av teim dugnaligu fólkum - sum í dag starvast innan almenna umsiting - kundu verið við til at ment vinnuna, og soleiðis tilført henni eina virðisøking, tí hesi fólk eru væl skúlaði. Tílík starvsglíðing er ikki óhugsandi - hon er neyðug - skulu vit framhaldandi menna inntøkugevandi framleiðsluna.

Í einari tílíkari umskiping, er ikki bert neyðugt, men eisini sømuligt, at avvarandi mynduleiki viðgerð - saman við yrkisfeløgum - hvørjir møguleikar eru fyri at hjálpa starvsfólkum víðari á starvsbreytini, soleiðis at man ikki einvegis setur starvsfólk í eina óhjálpiliga støðu.

Sjálvur eri eg av teirri fatan - eftir at eg í nógv ár havi umsitið fíggjar- og starvsfólkaviðurskiftið - at leiðandi mynduleikin skal greiða fólki frá avleiðingum av tiknum avgerðum. Alt annað er dupultmoralskt, og vanvirðing av dugnaligum samstarvsfelagum.

Orðatak er í sigur, " Sig ongantíð nakað um onnur, sum tú ikki sjálvur vilt siga teimum". Orsøkin til at valevnini ikki vilja kjakast nærri um møguligar avleiðingar er, at tey óyva hugsa um, at tey eru í vanda fyri at missa eina ella tvær atkvøður.

Men álvaratos, halda valevnini veruliga at fólk eru so lítið hugsandi, at tey ikki kunnu rokna møguligar avleiðingar út.

Um tað er kostnaðurin - fyri egið trúvirði - vil eg fegin gjalda prísin.

# Dagførdar miðnámsútbúgvingar

**Eyðgunn Samuelsen**
*valevni Javnaðfloksins í Norðoyggjum*



Í virkisskránni hjá Javnaðarflokkinum stendur : "útbúgvingartilboð teirra 16-19 ára gomlu byggir á eitt grund- ella støðisár aftaná fólkaskúlan" .

Í dag hava vit 5 ymiskar miðnámsútbúgvingar: HF, Student, HT, ið er ein tøknilig studentútbúgving á Tekniska skúla í Klaksvík, HIF, ið eisini er ein studentaútbúgving á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna og FHS/HH, ið tilsaman geva handilsliga studentsútbúgving.

Føroyar eru eitt lítið land, men vit hava valt politiskt at hava miðnámsútbúgvingar, umframt í miðstaðarøkinum, eisini í Vestmanna, Eysturoy, Norðoyggjum og Suðuroy. Hetta val gongur Javnaðarflokkurin inn fyri, tí vit meta tað altavgerandi, at tey ungu eru nærhendis heimbygdini meðan tey taka miðnámsútbúgving fyri at økja um møguleikan fyri at tey ungu koma aftur til heimbygdina/oynna eftir loknan lestur. Hetta má sjálvandi fylgjast upp við førleikakrevjandi størvum kring landið, so tey ungu hava valmøguleikan at búseta seg í ella uttanfyri miðstaðarøki, tá tey koma heimaftur.

At hava 5 ymsar miðnámsútbúgvingar virkar væl í miðstaðarøkinum, tí har er eitt størri fólkagrundarlag enn í restina av landinum. Tað er trupult at fáa hesa skipan at virka optimalt uttanfyri miðstaðarøki, sjálvt á Kambsdali kunnu tað vera smáir flokkar, ið minka um valmøgu-leikarnar hjá teimum ungu.

Hinvegin kann ein eisini spyrja, um samfelag hevur brúk fyri so stórari spesialisering í heili 3 ár, sum miðnámsútbúgvingarnar í dag geva. Tøkniliga menningin gongur so skjótt í dag, at servitan eldist skjótt og kundi tað bent á, at samfelagnum tørvar fólk ið hava nakrar felags førleikar, sosum at duga at arbeiða sjálvstøðugt, at duga at nýta vitan frá ymsum lærugreinum í einum heildarhøpi og at duga at samstarva við onnur og ikki minst, ein grundleggjandi fakligan førleika í lærugreinum sum enskt, føroyskt, støddfrøði, alisfrøði, lívfrøði og evnafrøði. Tað er júst hetta, ið eitt grund- ella støðisár aftaná fólkaskúlan kundi innihildi, síðan kundu næmingarnir valt sergrein: student, tøkni, handil ella fiskivinnu seinnu tvey árini.

At okkara miðnámsútbúgvingar krevja dagføringar er ongin ivi um, allar tær donsku miðnámsútbúgvingarnar ið okkara eru grundaðar á, eru dagførdar við einum reformi ið kemur at virka í 2005. Danski reformurin inniheldur júst eitt felags støði ið tekur _ ár.

Javnaðarflokkurin vil virka fyri at miðnámsútbúgvingarnar í Føroyum altíð eru dagførdar, so tær eru í minsta lagi á hædd við hini norðanlondini og samstundis nøkta tørvin ið føroyska samfelagi hevur brúk fyri. Javnaðarflokkurin ásannar at útbúgving og gransking er vegurin fram, um vinnan og kappingarføri framhaldandi skal økjast í Føroyum.

Vil tú stuðla einum nýmótans útbúgvingarpolitikki so stuðlar tú Javnaðarflokkinum.

# Øktir vinnu møguleikar

**Marja Lamhauge**
*valevni Sambandsfloksins í Eysturoy*



Sambandsflokkurin vil skapa karmar fyri øktum vinnumøguleikum, so tað gerst lættari at stovna egi virki og harvið skapa fleiri arbeiðspláss

Sambandsflokkurin vil

arbeiða fyri, at lógin "Vinnuframalógir í Føroyum", verður sett til at virka, við at fáa kunngerðirnar til lógina lýstar og settar í verk. Vinnuframalógirnar vilja hjálpa íbirtarum at koma í gongd við egnum virki. Hesar lógir vóru gjøgnumførdar av Landsstýrinum, sum sat fram til 1998, meðan Sambandsflokkurin sat í Tinganesi. Men Tjóðveldis/Fólkafloks- og Sjálvsstýris Landsstýri hava ikki vilja lýst kunngerðirnar so skipanin fæst at virka.

Vinnuframalógirnar vilja sum sagt hjálpa íbirtarum og kveikjarum at koma í gongd. Eisini vilja vit arbeiða fyri at seta meira ferð á útbúgving og gransking, sum kann tæna vinnulívinum til frama, og á tann hátt skapa fleiri arbeiðspláss.

Fyri okkum í Eysturoynni, sum standa fyri 60% av vinnulívinum í Føroyum, hevur hettar sera stóran týdning Hetta vilja vit í Sambandsflokkinum arbeiða fyri.